# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Til minnis um Kristin Bærentsen

**19. apríl 1981 - 14. sept. 2008**



Eg má byrja við orðunum, sum pápi tín yrkti:

*Frá fyrstu stund, tú ljósið sá,*
*tú birti ljós í lon;*
*í eygum tínum lýsti tá*
*ein Himmalglæma von.*

Mín elskaði sonur! Eg helt, at hjarta mítt steðgaði, tá eg fekk boðini um, at lívið var farið úr tær. Tú var jú mítt elskaða barn: vakur, skilagóður, arbeiðssamur og álítandi. Tú var júst farin undir lívið við tíni elskaðu Beintu, sum vit øll vóru so glað fyri og góð við. Tú var abbasa drongur burturav, og Beinta og tú høvdu gjørt tykkum heim í húsunum hjá ommuni og abbanum á Argjum.

Tankarnir eru nógvir: Hevði eg havt kunnað steðga tær hin dagin, tá tú fór til Sands. Hevði eg havt tað, men »hvør veit á morgni at siga, hvat hann á kvøldi gistir«. Tú fór, óhappi hendi og tú læt lív, bert 19 mánaðir aftan á, at pápi tín lat lív av herviligari sjúku, bert 57 ára gamal. »Hørð eru lívsins kor«.

Seinastu tíðina av lívinum var tú sera hugtikin og spældi á gittar sangin: »Stairway to heaven« (Himmalvegurin). »Hetta er ein finur og góður sangur, sum eg eri komin at duga«, segði tú sjálvur.

At tú so skjótt skuldi ganga himmalvegin, vardi ongan. Men nú er tú heima í himmalinum, saman við pápa tínum, sum eisini elskaði teg so nógv. Tit líktust av lyndi: friðsamir, tolnir og góðir. Eg biði Jesus halda tykkum í sínum favni, saman við abba, tveimum pápabeiggjum og fastir.

Eg fari eisini at enda við orðunum hjá pápa tínum:

*Kring um Harrans høga tignarstól*
*flúgva fagrar einglafjøldir fegnar*
*- frítt er har, og aldrin setur sól -*
*tæna har sum Harrans trúgvu tegnar.*

**Mamman**

# Tøkk

Øllum tykkum, sum luttóku í okkara stóru sorg, tá vit mistu okkara høgt elskaða son, beiggja, drong, verson, svág, ommu- og abbason og systir- og bróðirson

**Kristin Bærentsen**
ættaður úr Skopun
búsitandi á Argjum

Ein tøkk til tykkum, sum komu á vanlukkustaðið og gjørdu tykkara besta fyri at bjarga honum.
Takk til øll, sum tóku sær av okkum ta fyrstu sváru tíðina.
Takk til tey, sum vóru í Kapellinum, og til prestarnar Ann Dahl Hansen og Jákup Reinert Hansen.
Stóra tøkk til arbeiðsplássið hjá Kristin, Faroe Ship, sum skipaðu fyri flutningi suður í teirra egna bili.
Fyri blómur til Kristin og gávur til okkum.
Takk fyri, at tit vóru so góð við Kristin.
Takk fyri køkur, blómur, kransar, peningagávur til okkara og til Skopunar kirkju.
Takk til tykkum, sum hava skrivað góð orð um Kristin, og takk til tykkum, sum skipaðu fyri jarðarferðini: sangarar, berarar, organistin og ljóðmannin.
Takk til tann stóra, stóra skara, sum fylgdi honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Takk til allar hendur, sum skipaðu fyri ervinum í Ungmannahúsinum Samljóð.

*Familjunnar vegna*
**Mamman**
**beiggjarnir og Beinta**

Tað er gott, at vit enn í dag eiga góð fólk, sum hjálpa tí neyðstadda: Harrin signi tykkum øll.
»Tann, sum lívgar onnur, skal sjálvur vera lívgaður«

# Ferðaleiðaraskeið í mars

Í døgunum 9. til 20. mars verður skipað fyri ferðaleiðaraskeiði á Føroya Fólkaháskúla. Skeiðið er skipað sum fyrireiking til ferðaleiðaraskúlan “Service & Co” í Spania.

Undirvísarar frá “Guideskolen Service & Co. Eru Súsanna Gunnarsson og Uffe Helsing Andersen.

Súsanna Gunnarsson er føroysk. Hon flutti til Norra í 1994 og hevur sjálv tikið útbúgving hjá Service & í Spania og hevur arbeitt sum ferðaleiðari í fleiri ár. Uffe Helsing Andersen er kendur við føroysk viðurskifti. Hann var ferðaleiðari ferðavinnusesongina í Føroyum í 2003 og hevur hildið fyrilestrar um ferðavinnuskúlan í Spania.



*Súsanna Gunnarsson frá ferðavinnuskúlanum Service & Co. (uttast til høgru á myndin)*

Undirvíst verður um ferðavinnuna í Føroyum, kunningartænastu, sølu og tænastuveiting, eisini verðurnorðurlendskmálvenjing, mikrofonvenjing, undirhald og um hvussu tað er at vera útstationeraður sum ferðaleiðari.

Skeiðið kostar 7.000 krónur (vistarhald er íroknað). Tilmeldingarfreistin er sett til 19. februar. Áhuga kunnu venda sær til Føroya Fólkaháskúla á tel. 311743 ella teldupost: haskulin@haskulin.fo

**85 ára føðingardagur**
Sunnudagin 8. februar verður Símun Pauli Poulsen, Fuglafirði, 85 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum

**Silvurbrúdleyp**
11. februar hava Jórun & Trøndur Ennistíg silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin heima, Niðaragøta 54, 188 Hoyvík, frá kl. 18.00.

**Dagurin**
**5. februar. Ata**, deyð umleið ár 250. Henda vakra unga gentan í Cataniu á Sikiloy vildi ikki lovast heidnum friggjara, av tí hon var kristin, og varð eftir ræðuligar pínslur tikin av døgum. Navnið er grikst og merkir tann góða.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

†

Urnan við

**Ian Onghamar**

fer úr kirkjugarðskapellinum leygardagin klokkan 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Eyðna og Lilian**

# Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæra

**Rigmor Thomsen**
Norðragøtu

andaðist og varð jarðað.

**Familjan**